**UTTAN ÚR HEIMI**

## Ríkmaður í rættin

Í gjár var fyrsti rættarfundurin í málinum ímóti ríkasta manni í Russlandi, Mikhail Khodorkovskij, sum er ákærdur fyri skattasvik og annað svik fyri fleiri milliardir krónur. Verður hann dømdur sekur, kann hann fáa upp í 10 ára fongsul.

Ákæruvaldið vil vera við, at hann hevur skákað sær undan at gjalda russiska ríkiskassanum fleiri milliardir krónur í skatti og avgjøldum, og í vikuni segði ein dómstólur, at Khodorkovskij skal gjalda ríkiskassanum einar 20 milliardir krónur. Sjálvur hevur hann sagt, at rættarmálið ímóti sær er politiskt, tí at hann hevur stuðlað politiskum mótstøðumonnum hjá Vladimir Putin, forseta.

Tann 41 ára gamli Khodorkovskij stovnaði í síni tíð oljufelagið Yukos. Í oktober í fjør varð hann tikin, tá privatflogfar hansara millumlendi á einum flogvølli í Sibiria. Hann verður hildin at vera ríkasti maður í Russlandi, og serkøn halda, at hann eigur pengar og virði fyri einar 100 milliardir krónur.

## Lumpaði løgregluna

Myndugleikarnir í Týsklandi søknast nú eftir islamiska leiðaranum Metin Kaplan, og myndugleikar í øllum londum hava fingið boð um at leita eftir honum.

Metin Kaplan hevur fleiri ferðir almannakunngjørt sínar víðgongdu islamsku hugsjónir, og tað fekk týskar politikarar at krevja, at hann skuldi vísast úr Týsklandi. Málið kom fyri rættin, men ein dómstólur gjørdi av, at maðurin hevði rætt at verða verandi í Týsklandi. Mikudagin broytti ein annar dómstólur avgerðina, men tá løgreglan fór eftir Metin Kaplan, var hann horvin.

Nú kjakast týskarar um, hvør hevur skyldina av, at maðurin slapp til rýmingar. Løgreglan heldur seg ikki hava gjørt nakað skeivt, og trygdartænastan sigur tað sama. Boðini frá politikarunum eru greið: Finnið mannin og sendið hann av landinum! Summi halda, at hann er longu rýmdur úr Týsklandi.

## Arnold væl dámdur

Filmsleikarin Arnold Schwarzenegger er væl umtóktur sum guvernørur í amerikanska statinum Kalifornia.

Ein kanning vísir, at 65 prosent av kaliforniska fólkinum eru nøgd við tað, sum hann hevur fingið frá hondini, síðani hann gjørdist guvernørur, og so stóra undirtøku fingu teir báðir seinastu í guvernørstarvinum, Pete Wilson og Gray David, ongantíð, skrivar Aftenposten.

Tað er hinvegin ikki vist, at hann fer at varðveita ta stóru undirtøkuna. Búskapurin í Kalifornia er illa fyri, og Schwarzenegger hevur sagt, at skal hallið á fíggjarlógini, sum er 14 milliardir dollarar, fáast burtur, er einki annað at gera uttan at hækka skattin. Tann avgerðin verður neyvan væl dámd ímillum veljararnar og fer uttan iva at ávirka umdømið hjá guvernørinum, skrivar Los Angeles Times.

## Ballón mátti neyðlenda

Ein luftballón við 26 fólkum umborð mátti neyðlenda eystan fyri Stockholm hóskvøldið, tí vandi var fyri, at hon fór at detta niður í havið.

Bæði svenska sjóverjan, bjargingartænastan og løgreglan komu á staðið, eftirt at teir báðir ballónskipararnir høvdu boðað frá, at teir fingu ikki ballónina at seta seg. Teir gjørdu fleiri royndir, men ballónin rak longri og longri frá landi, og at enda var vandi fyri, at brennievnið fór at ganga undan.

Ballónskipararnir gjørdu tí av at neyðlenda á sjónum. Tað gekk væl, og tey 26 fólkini vórðu tikin upp. Eingin fekk skaða av ferðini, sum bleiv fyriskipað í sambandi við, at eitt av ferðafólkunum hevði 40 ára føðingardag.

# Tey eiga at fáa sekkin

**Samstundis sum undirtøkan hjá George W. Bush, forseta minkar, harðna álopini frá andstøðuni. Nú krevur hon, at fleiri av næstu medarbeiðarum forsetans skulu koyrast frá**

USA
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*



*Condoleezza Rice, trygdarráðgevi hjá Bush, er óegnað til starv sítt*

Tað harðasta álopið higartil kom frá fyrrverandi varaforsetanum Al Gore í einari røðu, sum hann helt á lærda háskúlanum í New York hóskvøldið.

Í røðuni legði hann forsetan undir at hava logið fyri amerikanska fólkinum. Hann vildi eisini vera við, at Bush hevur gjørt tað vandameiri at liva í heiminum, og at vandin fyri yvirgangi í USA er størri nú, enn tá forsetin tók við.

– Forsetin sannførdi meirilutan av amerikanska fólkinum um, at Saddam Hussein hevði ábyrgdina av atsóknini tann 11. september í 2001. Veruleikin var, at hann hevði einki við atsóknina at gera, segði Al Gore. Og hann helt fram:

– Tann 12. september í 2001 æt forsíðan á einum av teimum størstu fronsku bløðunum "Nú eru vit øll amerikanarar", og tá fingu vit stuðul um allan heimin. Nú síggja vit myndirnar av tí, sum er hent í Abu Ghraib-fongslinum í Irak. Hvat er tað, sum er hent í hesum tíðarskeiðinum?

Hann gjørdi greitt, at Bush má sleppa sær av við fleiri av sínum næstu medarbeiðarum. Hann hevndi Donald Rumsfeld, verjumálaráðharra, Paul Wolfowitz, varaverjumálaráðharra, Condolleezzu Rice, trygdarráðgeva, George Tenet, stjóra í CIA, og tveir embætismenn.

– Tey eru ikki nóg dugnalig. Støðan versnar fyri hvønn dag, so leingi tey sita í sínum størvum, segði Al Gore. Serliga verjumálaráðharin fekk ákoyringarnar:

– Land okkara er í vanda hvønn einasta dag, Rumsfeld er verjumálaráðharri. Okkum tørvar ein ein betri, segði varaforsetin hjá Bill Clinton.



*USA er í vanda, so leingi Donald Rumsfeld er verjumálaráðharri, sigur Al Gore.*



*Paul Wolfowitz, varaverjumálaráðharri eigur at fáa sekkin*

# "HIV-maðurin" latin leysur

**Ein iranskur maður, sum hevur smittað kvinnur og menn í fleiri londum við HIV, er latin leysur**

HIV
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Myndugleikarnir í fleiri londum halda, at Mehdi Tayeb hevur havt kynsliga samveru við meiri enn hundrað kvinnum og monnum uttan at siga teimum frá, at hann er smittaður við HIV.

Mehdi Tayeb gjørdist kendur undir heitinum "HIV-maðurin", eftir at hann hevði neyðtikið eina 18 ára gamla gentu í Svøríki í 1998. Tá svenska løgreglan rannsakaði íbúð hansara, funnu løgreglumenninir heilivág ímóti HIV og eina telefonbók við nøvnunum hjá 180 kvinnum.

Kanningarnar avdúkaðu, at Mehdi Tayeb hevði havt kynsligt samband við 130 kvinnur og tveir menn í Svøríki, USA og Kanada. Eingin teirra hevði fingið at vita, at hann hevði HIV. Tað vísti seg eisini, at Mehdi Tayeb hevði neyðtikið ímillum 20 og 25 av teimum 130 kvinnunum.

Eftir kravi frá svensku løgregluni bleiv Mehdi Tayeb tikin í Iran í fjør, men hósdagin frættist, at hann var latin leysur. Sviar hava fleiri ferðir kravt at fáa hann útflýggjaðan, men iransku myndugleikarnir hava ikki svarað kravinum.

Nú hevur svenska løgreglan spurt, hví hann er latin leysur, men iranar hava ikki svarað, skrivar Aftonbladet.

ítróttur

Nr. 101 • leygardagur • 29. mai 2004 • 78. árgangur • www.sosialurin.fo

## Dystir um vikuskiftið

**1. deild menn**

| Dagf. | Dystur | Dómari |
|---|---|---|
| 29.05 | GÍ-EB/S | Páll Augustinussen |
| 29.05 | VB-ÍF | Oddmar Andreasen |
| 29.05 | HB-B68 | Eiler Rasmussen |
| 29.05 | NSÍ-KÍ | Birgir Sondum |
| 29.05 | Skála-B36 | Lassin Isaksen |

**2. deild menn**

| | | |
|---|---|---|
| 29.05 | Sumba-KÍ | Jens Petur Brattalíð |
| 29.05 | FSV-TB | Georg Rasmusse |
| 29.05 | LÍF-B36 | Tummas P. Olsen |
| 29.05 | AB-B71 | Dan Højgaard |
| 29.05 | Royn-VB | Petur Skarðenni |

**3. deild menn**

| | | |
|---|---|---|
| 31.05 | GÍ-EB/S | Eugen Voda |
| 31.05 | TB-ÍF | Poul Poulsen |
| 31.05 | HB-B68 | Jónleif Frederiksen |
| 31.05 | NSÍ-SÍ | Palli Gregersen |
| 31.05 | Skála-Fram | Jákup M. Kjeld |

**1. deild kvinnur**

| | | |
|---|---|---|
| 31.05 | GÍ/B68-KÍ | Jan á Líðarenda |
| 31.05 | FSV-AB | Kristin av Kák |
| 31.05 | Sumba-EB/S | Mihai Matai |

# Todi tekur endaligu landsliðsstøðuna

**Eftir at hava latið dyrnar staðið glopp-aðar í trý ár, fer Todi Jónsson nú endaliga at boða frá, hvørt hann hevur eina framtíð á føroyska fótbóltslandsliðnum ella ikki**

TODI & LANDSLIÐIÐ
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



*Seinasti dysturin hjá Toda á føroyska landsliðnum var í mars mánaði 2001 í Luksemburg. Tá noyddist hann enn einaferð skaddur av vøllinum, og júst skaðafrekvensurin var orsøkin til, at hann tá gav eitt fyribils avboð til landsliðið. Komandi viku verður greitt, hvørt hetta so bert var fyribils, ella um fremsti føroyski leikarin tá spældi sín seinasta landsdyst*

Eftir at danska kappingin endar um vikuskiftið, fara leikararnir hjá FCK í eina stutta summarfrí.

Ikki óvæntað fer Todi Jónsson at halda hesa í Føroyum, og ein av teimum fimm døgunum, sum hann verður her heima, veður talan um ein tíðindafund, sum skal haldast í Havn. Og her eru tað fyrst og fremst tvey mál, sum verða á skránni.

Annað er kunning um dystirnar, sum FCK fer at spæla í Føroyum móti ávíkavist KÍ og HB.

### Kanska'ið skal burtur

Hitt málið er støðan hjá Toda viðvíkjandi landsliðnum. Tað eru nú trý ár síðani, at Todi boðaði frá, at hann ikki sá seg føran fyri at taka lut í aljtóða dystunum hjá Føroyum. Spurningurin um eitt møguligt come-back hevur javnan verið frammi, men enn hevur svarið hvørja ferð verið hitt sama: Ikki í løtuni.

Nú er tó liðugt við hesum. Sjálvur vil Todi einki siga, hvørji boðini verða á tíðindafundinum, men sambært tí, sum Sosialurin er kunnaður um, so hevur eitt ávíst samband verið millum Toda og FSF seinastu dagarnar.

– Hetta er ein spurningur, sum alla tíðina hevur verið frammi hesi seinastu trý árini. Satt at siga, so hevur tað til tíðir verið eitt sindur møðsamt at hoyra hetta umaftur og umaftur, so nú fari eg at taka eina endaliga støðu, sigur Todi.

Hvør støðan verður, vil hann sum sagt ikki siga, men hann vónar, at hann á tíðindafundinum kann svara nøkrum av teimum spurningum, sum hava verið reistir seinastu mongu árini.

– Og so vóni eg, at tey, sum hava funnist at míni avgerð, verða til staðar. Hetta verður so seinastu ferð, at eg yvir høvur fari at umrøða hendan spurningin, og eg ætli mær so at svara øllum spurningum so væl, sum eg yvirhøvur kann.

Meira enn tað sama fæst ikki burturúr Toda hesum viðvíkjandi. Ikki annað, enn at diskussiónin kring evnið er liðug, tá tíðindafundurin er av. Og tað kann so innibera eitt av tveimum møguliga. Antin at málið verður avgreitt við at leikarin aftur sigur seg vera tøkan, ella at tað verður sligið fast, at talan ikki verður um fleiri dystir og harvið basta.

### Gleðir seg til FCK-ferðina

Hitt málið á tíðindafundinum verður sum sagt komandi Føroya-ferðin hjá FCK. Ein ferð, har Todi hevur havt ein sera aktivan leiklut, og har tað hálva vegna er hann, sum stendur fyri ferðini.

– Tað er einki at ivast í, at hetta er nakað, sum eg gleði meg til. Eg havi nú veð í FCK í rættiliga nógv ár, og fyri meg er tað ein stórhending, at eg soleiðis kann vísa teimum mítt heimland. Hetta er nakað, sum eg onkra tíð havi hugsað um, og nú bæði KÍ og HB fylla 100, var tað eitt upplagt høvi at fáa hetta í lag.

– Fyri flestar av leikarunum er galdandi, at teir ikki hava verið í Føroyum, so eg vóni, at vit fáa stundir til at upplivað eitt sindur av landinum. Í øllum førum, so verður talan um eina ferð til Klaksvíkar, tá KÍ-dysturin stendur á skránni, og so fáa vit at síggja, hvussu nógv annað vit fáa stundir til, heldur hann.

Og spurdur, hvørt talan verður um eitt FCK-lið í sterkastu uppstilling, sigur hann, at tað verður tað.

– Einasti leikarin, sum ikki er við, verður helst Magnus Kihlstedt, sum tá er við svenska landsliðnum, men annars verða teir so allir við. Bæði Santos og Zuma og hvat teir annars eita. So er bara at vóna, at eg sleppi at byrja inni í álopinum, tekur hann heldur skemtandi til at enda.

Á Høng Gymnasium hendur tað eisini naka, tá ið klokkan hevður ringt út



Gymnasium og HF – skeið við kostdeild.
Ring ella hygg á heimasíðu okkara.

www.hoeng-gymhf.dk
tlf.:+45 5885 2636

Høng Gymnasium og HF

www.sosialurin.fo
www.sosialurin.fo